NSÍ-VB 5-1 (1-1):

# Runavíkingar við fullari ferð



*Hóast VB var vandamikið í kontra-fasuni, so helt NSÍ verjan fyri tað mesta fast*

*Mynd: Bárður Lydersen*

**Við sannførandi avrikum í seinastu dystunum hevur NSÍ av álvara sett kósina upp eftir stigatalvuni**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Fyri fyrstu ferð í ár hava runavíkingar vunnið á heimavølli. At talan so eisini gjørdist um ein sannførandi 5-1 sigur, hava tey í kommununi helst einki ímóti, og tá mótstøðuliðið so eisini vóru kontra-serfrøðingarnir úr Vági, gerst úrslitið á ongan hátt verri.

## Vandamikil kontra

Dysturin byrjaði nærum soleiðis, sum roknast kundi við. Nógvi vindurin darvaði tó spælinum, men tað var fyri tað nógva NSÍ, sum royndi at leggja trýst á.

Og hetta tóktist eisini at hóva gestunum væl. Teir lógu aftarliga á vøllinum, og so dúvaðu teir upp á kontra, har bólturin ofta varð sendir langt niðan á vøllin, har kviku framherjarnir og kantarnir so høvdu til uppgávu at bjóða av.

Nakrar vandastøður stóðust eisini av hesum, og tað eydnaðist eisini vágbingum at leggja seg á odda. Hetta hendi, tá Poul N. Poulsen stútaði innlegg í kassan, og løtu seinni var heilt nær við 2-0, tá drønskot reyk beint á samankomingina.

## Fullu saman at enda

Spakuliga vaknaðu runavíkingarnir tó. Teir fingu spælið at hanga betri saman, og so líðandi gjørdist talan eisini um fleiri møguleikar. Men tað skuldi eitt hornaspark til, áðrenn hol kom á. Vágbingar megnaðu ikki at rudda burtur, og eftir fleiri royndir eydnaðist at enda Helga L. Petersen at smekka bóltin í kassan.

Eftir steðgin vóru tað runavíkingarnir, sum stóðu fyri tí nógva. Nú vóru tað teir, sum høvdu vindin undan, og tó at gestirnir stríddust væl, so lá eitt mál afturat til heimaliðið alla tíðina í luftini. Og tá Andy Olsen hegnisliga avgreiddi innlegg úr vinstru, var liðið eisini á sigurskós. Vágbingar megnaðu sjáldan at skapa so øgiliga nógv afturat, og tó at teir áhaldandi stríddust fyri møguleikanum, so tóktist hetta ikki at muna.

Og seinasta korterið fall alt saman. Fyrst slapp Christian Høgni Jacobsen avstað, tá Helgi L. Petersen mest sum tacklaði bóltin til hansara. Minuttin seinni kundi Ike nærum renna beina leið gjøgnum VB-verjuna við bóltinum, áðrenn hann sendi í kassan, og at enda slapp ungi Hjalmar Dalbúð upp í part, tá hann kundi gera sær dælt av mistaki frá Bjarna í VB-málinum.

## Við í oddinum

Fyri NSÍ bar sigurin við sær, at teir nú eru um at vera heilt væl við í oddastríðnum. Komandi umfarið bíðar ein trupul útidystur í Gøtu, har tey ikki halda stigini standa mát við avrikini, og í øllum førum hevur lokal-uppgerðin ongantíð verið nakar lættur dystur hjá NSÍ.

Megna teir at vinna her, so fer tó av álvara at síggja ljóst út. Ikki minst tí hini oddaliðini nú øll stríðast innanhýsis komandi dystirnar, og tað kann geva øðrum møguleika at sleppa framat.

Hjá VB mundi avrikið hinvegin kennast sum eitt slag í andliti. Stóran part av tíðini var avrikið á eini heilt góðari leið, og tað kunnu teir helst vera nøgdir um. Hinvegin kann ikki góðtakast, at liðið soleiðis fór niður við høvdinum seinastu tíðina, og ivaleyst verður tað hetta, sum verður á skránni, tá dysturin skal eftirmetast.

## FAKTA UM DYSTIN

**NSÍ-VB 5-1 (1-1):**
0-1: Poul N. Poulsen, 4.
1-1: Helgi L. Petersen, 41.
2-1: Andy Olsen, 59.
3-1: Christian Høgni Jacobsen, 77.
4-1: Ikechukwu Onyema, 78.
5-1: Hjalmar Dalbúð
**Dómari:** Suni Johansen
**NSÍ:** Jens Martin Knudsen – Brynjálvur Nielsen, Óli Hansen, Viggo Johannesen, Einar Hansen (Ikechukwu Onyema, 62.)– Andy Olsen (Debus Danielsen, 70.), Helgi L. Petersen (Hjalmar Dalbúð, 82.), Jústinus R. Hansen, Jónstein Petersen – Christian Høgni Jacbosen, Dánjal Hansen
**GK:** Ikechukwu Onnyema, 78.
**VB:** Bjarni Johansen – Mortan úr Hørg, Anders Sørensen, Michael í Lágabø, Kári í Lágabø – Símun Samuelsen, Milan Kulic, Evrad Ble, Nenad Zivanovic – Poul N. Poulsen (Jón K. Poulsen, 86.), Dan Djurhuus (Sigmund Mikkelsen, 80.)

# Brøndby styrkti um sína støðu

**FCK tapti fyri fyrstu ferð í ár, og nú hava teir, undan vitjanini í Brøndby 2. hvítusunnudag, knívin á barkanum**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Hósdagin vann Brøndby donsku steypakappingina. Tað gjørdu teir eftir longda leiktíð moti FCM. At spælararnir sinniliga og kropsliga vóru serliga troyttir bar við sær, at Brøndby venjarin, Michael Laudrup, undan vikuskiftinum segði seg vera væl nøgdan, um munurin frá Brøndby og aftur til FCK eftir vikuskiftið var tann sami, sum hann var undan vikuskiftinum.

Eftir vikuskiftið er munurin eitt stig størri, enn hann var, og tí var Brøndby venjarin væl nøgdur, eftir at Brøndby á Odense stadion hevði spælt 1-1 móti OB, sum ikki hevur vunnið higartil í vár.

Undan vikuskiftinum hevði Michael Laudrup roknað við, at FCK fór at tryggja sær trý stig í Parkini, har Silkeborg vitjaði. Silkeborg hevði ikki tapt í seks dystum á rað. Hesa ferð vunnu teir 1-0, og harvið steðgaði sigursrøðin hjá FCK, sum hevði vunnið sjey ferðir á rað.

Sjey umfør eru eftir av hesum kappingarárinum. 2. hvítusunnudag skal FCK spæla í Brøndby. Áhugin er so mikið stórur, at øll atgongumerkini eru seld. FCK hevur knívin á barkanum. Um teir framvegis skulu hava møguleika at vinna DM, so er alneyðugt hjá teimum at vinna øll stigini. Um Brøndby vinnur trý stig, so verður munurin átta stig millum stóru kappingarneytarnar, og so verður ilt at ímynda sær, at talan verður um stórvegis kapping um DM seinastu seks umførini.

AaB hevur togað seg fram á triðja plássið. Í Danmark verður mett, at teir í Aalborg eiga besta liðið, síðani teir í 1999 við núverandi FCK venjaranum, Hans Backe, við róðrið, vóru meistarar. Hesa ferð vann AaB á heimavølli 3-1 á AGF, sum í longum løtum var heilt niðurspælt.

FCM megnaði hvørja ferð í tjúgu teimum fyrstu royndunum á nýggja stadion í Herning at fáa stig. Nú hava teir tapt tvær ferðir á rað. Hesa ferð taptu teir 2-1 fyri Viborg, sum er á sætta plássinum og framvegis er við í kappingini um Royala fjórða plássið.

FCM, sum í vetrarsteðginum var nummar tvey, heldur hóast tvey tap á rað, tørn um fjórða plássið. Men kappingin er stór frá Esbjerg, sum rættuliga er komið fyri seg. Hesa ferð vunnu teir á heimavølli 3-1 á FCN, sum legði seg á odda í 12. minutti, men bara var frammanfyri í ein minutt.

Tá ið hálvur tími var farin, varð ein av FCN monnunum vístur av vøllinum fyri at hevna seg. Venjarin og liðfelagarnir vóru so fortørnaðir inn á mannin, sum hevndi seg, at tað varð tosað um, at hann skal blakast úr felagnum.

FCN stríðist fyri at sleppa undan at flyta niður. Teir eru á niðurflytingarplássi saman við Herfølge. Gamla meistarafelagið hjá Jákupi Mikkelsen var í Randers, har úrslitið var 1-1. Randers er einasta felagið, sum Herfølge og FCN hava møguleika at fáa aftur. Á hvítusunnu sær skráin í superliguni soleiðis út: Silkeborg-FCM spæla hvítusunnudag, og 2. hvítusunnudag verður spælt soleiðis: OB-Randers, Viborg-Esbjerg, AGF-Herfølge, FCN-AaB og Brøndby-FCK.